## Góð lønarhækking

Teir seinastu dagarnar hevur vandi verið fyri stórum verkfalli í finska heilsuverkinum, men seinnapartin í gjár samdust partarnir um eitt semingsuppskot, og verkfallið verður tí av ongum. Men tað gjørdist dýrt hjá arbeiðsgevarunum at sleppa undan verkfalli, tí eftir semingsuppskotinum fáa sjúkrarøktarfrøðingarnir og røktarstarvsfólkini millum 22 og 28 prosent afturat í løn tey næstu fýra árini. Av hesum koma 10 prosent oman á lønina næsta ár.



*Matti Vanhanen, forsætisráðharri, lá sjálvur á sjúkrahúsi, tá semja fekst*

# Høganes verður ein ark

**Tað verður øðrvisi hjá fólki, sum fara at byggja undir Høganesi enn hjá fólki, sum byggja aðrastaðni í Nes kommunu. Býlingurin verður neyvt stýrdur av arkitektum, og tú fer ikki at kunna byggja, seta og mála húsini, sum tú sjálvur vilt – og bilurin fer at standa í felags bilhúsi**

HØGANES

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stórur áhugi var fyri framløgufundinum av Høganes-ætlanini, sum Nes kommuna skipaði fyri á Runavíkar Sjómansheimi seinasta leygardag. Fólk í hópatali vóru møtt, og kommunan hevði eisini syrgt fyri, at aktivir partar í ætlanini vóru møttir, bæði arkitektar, ráðgevar og umboð fyri fíggingarstovn.

Nes kommuna skipaði fyri framløguni í sambandi við, at fyrsta byggistig í stóru Høganes-ætlanini er við at koma undir land. Í hesum fyrsta partinum verða 29 grundøkir til sethús og fýra íbúðarblokkar.

Eftir framløguna var høvi hjá fólki at fara niðan undir Høganes at hyggja at lendinum.

Tað var borgarstjórin í Nes kommunu, Símun Johannesen, sum legði fyri á Runavíkar Sjómansheimi, og tað skiltist, at hann var ovfarin av, at so nógv fólk vóru møtt.

Hann greiddi frá, at arkitektarnir, Anders Abraham og Høgni T. Hansen, sum báðir vóru á fundinum, hava arbeitt nógv við verkætlanini. Hesir hava arbeitt við uppskotinum um, hvussu økið, sum er leyst av øðrum økjum í kommununi, kann byggjast upp.

- Tað hevur tikið longri tíð enn ætlað at náa so langt, men her er eisini talan um eitt øki, sum í framtíðini skal rúma eini 800-1000 fólkum og øðrum fasilitetum.

Sum skilst, standa eini 150 fólk á bíðilista til grundøki í Nes kommunu, men kommunan hevur ymiskar smærri útstykkingar í gongd, samstundis sum arbeitt verður við stóru verkætlanini undir Høganesi.

Símun segði, at nógv spyrja seg fyri um grundøki í kommununi, og tað er heldur eingin loyna, at fólk spyrja, nær væntast kann, at tunnilin, sum knýtir økið til høvuðsstaðin, kemur.

- Vit mugu bara ásanna, at tað gongur seint við at seta hol á samráðingarnar um tunnilin.

Borgarstjórin nevndi ikki landsstýrismannin, Bjarna Djurholm, í hesum sambandi, men herfyri skrivaðu bløðini, at landsstýrismaðurin bíðar eftir eini játtan úr fíggjarnevndini til serfrøðihjálp til samráðingarnar millum myndugleikarnar og felagið, sum ætlandi skal byggja tunnilin.

- Vit vita, at tunnilin kemur, men vit vita ikki við vissu, nær hann kemur. Tað er avgerandi fyri stóru verkætlanina, at tunnilin kemur.

Hann segði, at vegurin inn undir Høganes í fyrstu syfti verður ein "blindur" vegur, men so skjótt, sum tunnilin kemur, verður vegurin bundin oman í tunnilsvegin.

- Tá fer tað at taka eitt korter at koyra inn í høvuðsstaðarøkið, legði hann aftrat.

Símun vísti á, at onkur helst heldur, at tað er gallskapur at byggja uppat økinum við Toftavatn, tí økið er so náttúruvakurt.

- Men sambært ætlanini verður ongastaðni bygt, soleiðis at nakað rennur frá økinum og í vatnið.



*Áhugin og fotvitnið er stórt í sambandi við Høganes-ætlanina*

Mynd: Vilmund Jacobsen



Hann segði, at bæði kommuna og arkitektar í ætlanini hava lagt stóran dent á at fara væl um økið, soleiðis at umhvørvið í størst møguligan mun verður varðveitt.

- Í verkætlanini verður sjálvsagt hugsað um tey "bleytu" virðini í økinum, og vit eru soleiðis eisini við í eini millumlandakapping, sum verður liðug í 2010. Í hesum sambandi arbeiða vit við at gera eina gøtu rundan um Toftavatn.

Símun Johannesen vísti á, at feløgini Munin og meklarafelagið Skyn eisini eru komin við upp í verkætlanina.

Danski arkitekturin, Anders Adam, dugdi væl at greiða frá verkætlanini, og undir liðini á honum var føroyski arkitekturin, Høgni T. Hansen.

Tað var Anders, sum førdi orðið fyri arkitektarnar.

Hann vísti á sera vøkru náttúruna í økinum og helt, at ógvuliga umráðandi er at fara væl um.